




# Leggja leiðingar millum Gadd og Heygar

**Nes kommuna selir grundøkini í útstykkingini millum Gadd og Heygarnar fyri 160 krónur fyri fermeturin**

ÚTSTYKKING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*– Áhugi er serliga fyri at byggja á økinum inn móti Heygunum, sigur Súni í Hjøllum, formaður í teknisku nevnd*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Arbeitt verður nú við at leggja leiðingar í vegaføringina millum Gadd og Heygarnar, sum er nýggja útstykkingarøkið í kommununi.

Hesin parturin av arbeiðinum fer at kosta umleið eina miljón krónur, tá ið arbeiðið verður liðugt seinni í summar.

Súni í Hjøllum, formaður í teknisku nevnd hjá Nes kommunu, sigur, at kommunan hevur gjørt fyribils semju við eigararnar.

– Grundøkir eru matrikulerað og tey, sum hava áhuga fyri at byggja, kunnu byrja longu í summar.

Nes kommuna selir grundøkini í hesi útstykkingini fyri 160 krónur fyri fermeturin.

Súni í Hjøllum sigur, at áhugi serliga er fyri at byggja á økinum inn móti Heygunum.

Í løtuni verða nøkur hús bygd fram við vegnum inn Undir Nesið á Toftum.

# Eitt átroðkandi mál verður nú loyst

**Borgarar á Nesi og Nes kommuna hava í mong ár roynt at fáa Landsverk at raðfesta vegastrekkið frá Nes kirkju og eystureftir. Umsíðir verða neyðugu ábøturnar nú gjørdar**

VEGAGERÐ
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Formaðurin í teknisku nevnd í Nes kommunu, Súni í Hjøllum, sigur, at nú er langt um leingi farið undir at breiðka landsvegin frá Nes kirkju og eystureftir.

– Bæði borgarar á Nesi og Nes kommuna hava í mong ár roynt at fáa Landsverk at raðfesta hetta vegastrekkið.

Súni ásannar tó, at tað hevur tikið óvanliga langa tíð at fáa gongd á hetta mál.

– Vit kunnu tó bert fegnast um, at tað umsíðir eydnaðist at fáa gongd á hetta átroðkandi mál, sum leingi hevur kravt ábøtur.



*– Tað hevur tikið óvanliga langa tíð at fáa gongd á hetta mál, sigur Súni í Hjøllum, formaður í teknisku nevnd í Nes kommunu*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Hann sigur, at hetta arbeiðið kemur at kosta kommununi einar 500.000 krónur.

– Tað verður Landsverk, sum kemur at bera tann stóra kostnaðin av hesum arbeiði, sigur Súni í Hjøllum.

# Dýpa bátahavnina í Oyrunum á Toftum

**– Arbeiðið fer helst at kosta einar tvær miljónir krónur, sigur formaðurin í teknisku nevnd, Súni í Hjøllum**

DÝPA HAVNINA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í løtuni verður ytsti hylurin í bátahavnini í Oyrunum dýptur.

Súni í Hjøllum, formaður teknisku nevnd í Nes kommunu, sigur, at dýpt verður soleiðis, at allur hylurin fer at hava eitt dýpi á 4 metrar. Kommunan hevur eisini keypt brýr frá einum alibrúki at leggja út eystarumegin í havnini.

– Við hesum arbeiði verður møguligt hjá teimum størru deksførunum at nýta hylin, og harvið verður eisini betri pláss í hylinum undir Fiskamarknaðinum.

Súni sigur, at grótið, sum verður tikið upp, verður brúkt til at leingja grótgarðin vestanfyri bátahylin.

Hann vísir á, at samlaða arbeiðið fer at kosta einar tvær miljónir krónur, tá ið tað er liðugt.

Tað er felagið, Sea Star, sum hevur fingið hetta arbeiðið at gera.

Súni í Hjøllum fegnast um, at umstøðurnar í bátahavnini í Oyrunum nú verða uppaftur betur.



*Ytsti hylurin í bátahavnini í Oyrunum verður nú dýptur, og brúgvar verða lagdar út eystarumegin*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Býarætlan og byggireglugerð

**– Tað verður eitt stórt framstig fyri borgararnar og kommununa annars at fáa eina býarætlan og eina byggireglugerð, sigur Súni í Hjøllum**

BÝARÆTLAN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Seinastu tvey árini hevur Nes kommuna arbeitt við at fáa eina góðkenda býarætlan fyri alla kommununa. Tað er Fuglø-arkitektar í Klaksvík, sum hava hjálpt teknisku nevnd við hesum arbeiði.

Súni í Hjøllum sigur, at talan er um eitt stórt og drúgt arbeiði.

– Um ársskiftið varð arbeiðið liðugt. Úrslitið lá alment frammi til viðmerkingar, áðrenn bygdaráðið so aftur skuldi viðgera málið. Vit fingu fleiri viðmerkingar, sum vit hava viðgjørt. Beint eftir summarfrítíðina skulu vit taka endaliga støðu.

Formaðurin í teknisku nevnd væntar, at málið verður sent landsstýrinum til góðkenningar eina ferð í september.

– Tað verður eitt stórt framstig fyri borgararnar og kommununa annars at fáa eina býarætlan og eina byggireglugerð. Nú fara fólk at vita, hvat tey kunnu vænta, og hvat tey kunnu halda seg til, tá um bygging ræður, sigur Súni í Hjøllum.